# Útbyggingin á Landssjúkrahúsinum liðug í 2003



**– Útbygningurin, sum verður bygdur á Landssjúkrahúsinum í løtuni verður væntandi liðugur í juni 2003. Bygningurin verður í fimm hæddum, og kemur ein stórur partur av virkseminum hjá landssjúkrahúsinum at ganga fyri seg har**

ÚTBYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Seinastu tíðina hevur verið rættiligt rok heimanfyri Landsjúkrahúsið. Hetta rok kemst av útbygging av Landsjúkrahúsinum, og heldur hon helst fram heilt til juni í 2003.

Sjúkrahúsleiðarin, Jóanis Erik Køtlum, hevur verið formaður í bygginevndini, men nú tá hann hevur sagt seg úr starvi, hevur Kristian Rasmussen, verkfrøðingur, tikið yvir fyribils.

– Arbeiðið er komið rættiliga langt, sigur Kristian Rasmussen.

– Ætlanin er, at øll innilokingin, tað vil siga betongarbeiðið, skal verða liðugt til apríl komandi ár, og tað sær út til at halda. Í løtuni verður arbeitt við fjórðu hædd, sum er næstseinasta hæddin.

Fimm ymiskar fyritøkur eru við í arbeiðinum. Innilokingini tekur danska felagið Pil & Søn sær av, umframt øllum timburarbeiðinum. Eitt annað danskt felag, Glenco Vsk., tekur sær av ventilatión, hita, saniteti og tí, sum hartil hoyrir. El-arbeiðið hevur KB El-teknik undir hond, málarameistari er Henning Sørensen og gólváleggjari er Eyðfinn Eyðunsson.

Niðasta hæddin skal hava laboratorium og nakað av tøknini. Á aðru hædd verður skaðastovan, intensiv deild, viðrakning, móttøka og forhøll. Triðja hæddin verður ein skurðdeild. Medisinska deild skal halda til á fjórðu hædd, og á fimtu og seinastu hæddini, verður ein nýtmótans seingjadeild.

Hetta er ein seingjadeild, ið uppfyllir øll krøv, sum verða sett til eina tílíka deild í dag. Har fara til dømis at vera tvey-songsstovur við egnum bað og WC.

Sambært Kristian Rasmussen hevur Landssjúkrahúsið slíkar stovur sum er, men tær eru als ikki í somu dygd, sum tær, ið bygdar verða nú.






## Tøkk



Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera føðingardagin hjá mær, sum varð hildin í Skálanum 10.08.2001, so hugnaligan og ógloymandi.

Takk øll somul fyri gávur og uppringingar. Serstøk tøkk til kokkarnar og forstandaran.

*Heilsan*
**Maria**



Byggingin úti í Bakka:

# Fútin má steðga henni

**Jóhan M. Mac Donald, sum stendur fyri byggingini av einum sethúsum úti í Bakka, ætlar sær ikki at steðga arbeiðnum, fyrr enn fútin setir forboð. Hann metir seg hava eitt lógligt byggiloyvi, og tí er eingin orsøk hjá honum at steðga. Annars finst hann harðliga at málsviðgerðini hjá Landsstýrinum**



*Ein sakleys bygging av einum sethúsum úti í Bakka, hava fingið allar fjølmiðlarnar í Føroyum at taka málið upp*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FÚTAFORBOÐ
*Stefan í Skorini*

Mikudagin skuldi Føroya Fútarættur taka støðu í málinum um byggingina av einum sethúsum á eini neystatekju úti í Bakka í Tinganesi í Havn. Málið verður ístaðin tikið upp hósmorgunin kl. hálvgum níggju, tí annar sakførarin fekk ikki møtt upp til ásettu tíðina mikudagin.

Tórshavnar Býráð hevur biðið fútarættin um at seta fútaforboð móti byggingini, tí landsstýrið hevur givið greið boð um, at býráðið hevur givið eitt ólógligt byggiloyvi. Byggisamtyktin fyri økið skal broytast, áðrenn byggingin kann halda fram, eru boðini úr landsstýrinum. Tí kennir býráðið seg kroyst til at fara í fútarættin fyri at steðga henni, hóast loyvi av fyrstan tíð er givið.

Landsstýrið gav býráðnum endalig boð um at steðga byggingini longu 3. oktober, men Jóhan M. Mac Donald, sum byggir húsini, heldur fram við arbeiðnum, til fútaforboðið er sett í gildi.

Hann heldur, at hann hevur eitt lógligt og undirskrivað byggiloyvi, og tí fara hansara arbeiðsmenn ikki at leggja amboðini frá sær, fyrr enn fútin hevur tikið støðu.

Jóhan dylur ikki fyri, at hann hevur góðar vónir til rættarmálið í fútarættinum. Hann væntar ikki, at byggingin fer at steðga í dag, hósdagin, eftir at málið hevur verið fyri, tí hann hevur eitt lógligt byggiloyvi.

Hann leggur afturat, at tað kann ikki vera rætt, at hann skal svíða fyri, at umsitingin hevur gjørt ein brølara í hesum málinum.

### Vánalig embætisførsla

Jóhan er ikki sørt firtin um ta viðferð, hann hevur fingið av landsins myndugleikum í hesum málinum.

Hann vísir á, at tann upprunaligi leigusáttmálin lá í landsstýrinum í tvey ár, áðrenn hann varð góðtikin. Tá skuldi alt verið í lagi. Men tá grannarnir Ólavur Ellefsen og Jonhard Eliasen kæra málið til landsstýrið nú í summar, so verður byggingin steðgað, og tað heldur Jóhan ikki er í lagi.

Jógvan Arge hevur annars í bløðunum víst á, at býráðið hevur borið seg ógvuliga skeivt at í hesum máli. Tí var tað ikki løgið, at býráðið fekk málið aftur í høvdið.

– Talan er ikki um eitt lítið frávik í byggisamtyktini, men hinvegin um eitt frávik, sum krevur, at býráðið tekur samtyktina til ítøkiliga viðgerð, sigur Jógvan Arge.

Hann vísir á, at ein minniluti í býráðnum, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Heðin Mortensen, vísti á, at byggisamtyktin mátti til viðgerðar, áðrenn byggingin kundi byrja, men at meirilutin bara koyrdi málið ígjøgnum uttan neyðug loyvi.

Hann leggur afturat, at mannagongdin er skilaleys og sømir seg ikki tí kommunala myndugleikanum í høvuðsstaðnum.

Heðin Mortensen sigur við Dimmalætting, at hann roknar ikki við, at húsini verða tikin niðuraftur. Tey kunnu verða brúkt til onnur endamál, tá tey eru liðug.

## Grind í Hestfirði

GRINDABOÐ
*Stefan í Skorini*

Mánadagin vóru grindaboð í Hestfirði. Ein maður hevði sæð ein grindabólk úr bilinum á Velbastað, og hann boðaði beinanvegin frá. Hetta var stutt eftir middag.

Sýslumenn og grindaformenn fingu boðini, og nakrir bátar løgdu frá landi at leita eftir grindini.

Men grindin var ikki at finna, tá bátarnir fóru at leita eftir henni. Hesin bólkurin slapp sostatt væl frá at svimja millum oyggjarnar á hesum sinni.

# Duettir av Mozart og Halvorsen



*Sámal Petersen, violin*



*Nikolaos Kapnas, bratsj*

TÍÐINDASKRIV

Komandi vikuskifti skipar Musica Viva fyri tveimum kirkjukonsertum. Tað eru teir báðir Sámal Petersen, violin og Nikolaos Kapnas, bratsj, ið fara at framføra duettir eftir W. A. Mozart og J. Halvorsen.

Erkabiskuppurin frá Salzburg bílegði í 1783 eina røð av duettum frá Michael Haydn. Haydn bað, vegna sjúku, Mozart smíða tvær tær fyrstu fyri seg. Í duettunum eftir W. A. Mozart er violinin konserterandi og bratsjin hevur ein meira týðandi leiklut enn í duettunum eftir M. Haydn.

Norðmaðurin John Halvorsen (1864-1935) varð violinistur, tónaskald og orkesturleiðari. Passacaglia, ið Sámal og Likolaos fara at framføra, er smíðað úr 7. suitu av 12 eftir G. H. Haendel. Passacaglia er eitt slag av barokktónleiki, hildin at vera úr sponskum dansi.

Fyrsta konsertin við Sámali og Nikolaos verður fríggjakvøldið 12. oktober kl. 19.00 í Kvívíkar kirkju. Leygarmorgunin 13. oktober kl. 11.30 verður Matiné við somu skrá sum fríggjakvøldið í Havnar kirkju.